LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 24. januar 2025
J. nr.: 25/01079-2

Svar

uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-071/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um valevnislistar til kommunuval.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat er endamálið við at hava mark fyri, hvussu nógv valevni kunnu standa á sama lista til kommunuval?
2. Ætlar landsstýrismaðurin at arbeiða fyri at broyta hetta?
3. Hvussu heldur landsstýrismaðurin, at kommunuvalið í 2024 gekk í síni heild?

Svar:

Til spurning nr. 1 og 2

Endamálið er helst at tryggja fólkaræðisligan dynamikk við at eggja til fleiri listar, men í viðmerkingunum til kommunuvallógina verður ásetingin ikki neyvari viðgjørd. Atlitini hjá spyrjaranum eru viðkomandi at taka við í viðgerðina, um farið verður undir at eftirhyggja kommunuvallógina við tí fyri eyga at gera broytingar. Eingin ætlan er um hetta í løtuni.

Til spurning 3

Løgmálaráðið metir, at kommunuvalið 12. novembur 2024 sum heild gekk væl. Øll bý- og bygdaráð vórðu mannað. Løgmálaráðið gjørdi eina kommunu varuga við, at valið ikki varð farið rætt fram sambært kommunuvallógini, og løgreglan viðger eitt mál um møguligt valsvik.

Bjarni K. Petersen
Landsstýrismaður